DAGSINS MEINING

Størsta framstigið síðani fyrsta Smiril

Vágatunnilin er óivað størsta frambrotið í føroyskari samferðslu síðani tvørámenn fyri stívliga hundrað árum síðani bygdu tann fyrsta Smirilin. Hann bant allar bygdirnar í Føroyum knappliga saman. Harafturat sigldi hann einaferð um mánaðin til Skotlands sambært tí fyrstu ferðaætlanini.

Hvønn týdning hann fekk, kunnu vit bara ímynda okkum. Men vit kunnu heldur ikki annað enn ímynda okkum, hvussu stóran týdning okkara fyrsti undirsjóvartunnil fer at fáa fyri føroyska samfelagið. Men nú kunnu vit staðfesta, at tríggjar oyggjar afturat eru bundnar saman.

Gongur sum ætlað við Norðoyatunnlinum verða seks oyggjar bundnar saman um eini fýra-fimm ár. Og tá skuldu virkis- og trivnaðarmøguleikarnir hjá flest øllum føroyskum fyritøkum verið so góðir sum ongatíð áður. Harafturat verða vinnu- og flutningsmøguleikarnir hjá 80 prosentum av fólkinum so góðir sum teir nú einaferð kunnu gerast.

Hava vit so í huga, at vit hava fingið eina nýggja ferju at sigla millum Streymoynna og Sandoynna, at nýggja ferja til Suðuroynna er í gerð, at nýggj ferjulega skal gerast í Kallsoynni, ja, so manglar okkum bara at fáa tíðarhóskandi skip at sigla í Kalsoynna og um Svínoyar- og Fugloyarfjørð. Tá hesar ætlanir væntandi eru framdar um nøkur ar, kunnu vit ikki klaga.

Meðan vit enn eru í gleðisróminum kunnu vit ikki annað enn fegnast um, at alt gekk so væl, tá Vágatunnilin alment lat upp í gjár, hóast skráin var sein á veg. Veitslurómurin var stórur og tað skilst, at allar veitslurnar vóru góðar. Bæði tann á flogvøllinum, á hotellinum, SÍF-húsinum og so tann fínara veitslan í høllini á Giljanesi.

Bert spell, at tá so stór veitsla verður hildin, at arbeiðsfólkið - teir og tær, sum hava gjørt tunnilin - ikki vórðu bjóðað við til ta stóru veitsluna. Tað sama er at siga um manningarnar á ferjunum, sum hava siglt um Vestmannasund. Slíkt líkist ongum, men hetta hendir ferð eftir ferð.

Til á midnátt kundu so fólk koyra ókeypis. Men hetta var ikki tí, at p.f. Vágatunnilin helt, at nú skuldi hann bjóða fólki ein ókeypis túr at royna tunnilin. Nei, hetta var tí, at eingir kubbar vóru eftir.

Nú skulu vit minnast til, at vit skattgjaldarar - tú og eg - hava goldið tveir triðingar av kostnaðinum. Tí hevði tað ikki verið annað enn rætt og rímuligt, at landsstýrið og nevndin fyri tunnilin komu ásamt um, at tað var ókeypis at koyra hesa vikuna og til sunnukvøldið. Um ikki annað, so hevði tað verið ein lítil jólagáva til skattgjaldararnar, sum bæði gjalda hetta og tað fínara gildið!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Samkyndur - og hvat so?

JACOB PEDERSEN
HF-lesandi, í Aalborg

Nú er alt rákið um rættindi hjá teimun samkyndu í Føroyum, at skáseta seg í parlag, eitt sindur avdempað, men tíbetur er spurningurin enn aktuellur.

Eg havi leingi hugsað, um eg skuldi skrivað eitt lesarabrøv, og blandað meg upp í kjakið, sjálvt um ein situr 1500 km. burturi, men eg mátti bara gera tað. (hetta gav mær sanniligani eitt kick, at fara undir at skriva lesarabrævið)

Nú havi eg lisið lesarabrævið hjá einum ávísum Ragnari S. Olsen. Tað er nú langt síðani, tú hevdi brævið í Dimmu og Sosialinum, (1. oktober haldi eg tað var) men betri seint enn ongantíð. Eg havi lisið brævið hjá tær væl ígjøgnum. Eg ivist ikki í, at tú ert ein fittur og fryntiligur persónur, men tá ið tað kemur til tínar meiningar um tey samkyndu, so haldi eg, at tú ert (sum danir siga) "langt ude i hampen".

Tú sigur orðarætt, at tú ikki fordømir nakran. Í brævinum hjá, haldi eg tvørturímóti, at tú ert sera fordømandi. Tað er alt í lagi og ein erlig sak, at tú ikki góðtekur "liviháttinum" hjá okkum samkyndu.

Men síðani fer tú at taka ymisk skriftstøð burturúr Biblini. Biblian er ein sera spennandi bók, men hon er skrivað fyri tveimun túsund árum síðani, og nógvar av teimun lógunum, sum vóru galdandi tá, eru tíbetur ikki galdandi í dag. Tað at tað skuldi vera synd at vera samkyntur í dag, tað er akkurát sum eisini farið í søguna, men enn hava fólk tann hugburð, at tað at vera samkyntur skuldi vera ein synd, bara tí tað stendur í Bibliuni.

Eg meini bara tað, at tað ber ikki til at hava Bíbluna sum lógarbók, í einum nútíðar føroyskum samfelag. Vit eru skjótt 3 ár inni í tað nýggja áratúsundáraskiftið. Biblian er ein halgibók ikki, ein lógarbók

So fer tú at skriva um moral og ómoral. Tað mást tú sjálvur um, hvat tú leggur í tað. Eg vil bara siga, at eg haldi, tað er totalt ómoralskt at siga, hvussu man velur at liva, og hvørjum kynið man velur at liva saman við, tað má vera fólks egna sak.

Eitt tað mest áloypandi er, tá tú fer at skriva, at tað at vera samkyntur skuldi vera trendy og IN. Tað er tað reina tvætl og nonsens. Tað kann væl vera, at tá ið tú tosar um, at tað skal vera trendy at vera samkyntur, so hevur tú kanska sæð tað í sjónvarpinum, t.d í samband við einum Hollywood produseraðum filmi (ella hvat veit eg). Orsøkin er allarhelst eisini tann, at tað at vera samkyntur tíbetur ikki longur er tabu-evni, og tí "siggjast" og hoyrast samkynt meira nú enn fyrr.

Homoseksuallitetur er ikki nakað sum kemur og fer. Tað hevur altíð verið til, og fer altíð at vera til. Og eitt annað er, at ein ikki verður samkyntur, tað er nakað ein verður føddur við.

Men tað allarmest áloypandi, tú skrivar, er tá ið tú nevnir tey pedofilu, og tey sum hava seksuellan umgang við djór. Skuldu tey hava viðurkenning og fara í skrásett parlag ? Tá má eg siga, at eg ikki havi nakra hóming av, hvat tú meinar við!? Tað virkar, sum tú vilt seta pedofili, sodomi og homoseksualitet í eina katagori?

Hesi kunnu als ikki samanberast. Sodomi er tað reina djóraplágarí, og viðvíkjandi pedofili, so er hetta tað mest andstyggiliga og vamlisligasta, sum yvirhøvur finst. Og eg vóni, at eg havi tikið feil, tá tú setur samkynd í sama rás sum tey pedofilu og tey, sum útinna sodomi.

Fyri at venda aftur til, tá tú skrivar at homoseksualitetur er synd og ómoralskt. Eg vil bara siga, at tað er onkin synd at vera samkyntur. Tað, sum er synd (haldi eg), er tá, um ein nú er samkyntur, "velur" at fortroyngja tað alt lívið og so velur at gifta seg við einari kvinnu (um ein nú er maður), og síðani fær sær børn. Hetta er "synd" fyri bæði børn og konu, men so sanniligani eisini fyri seg sjálvan. Tí man lýgur ikki bara fyri seg sjálvan, men eisini fyri sítt umhvørvið. Tað er alt ov hart at ganga og goyma seg fyri sínum verðuliga persóni. Eg veit ikki, um ein skal vera stoltur av at vera samkyntur. Ein er bara tað, sum ein er. Men ein er kanska blivin eitt sindur meira positivur og optimistiskur, aftaná ein hevur fortalt, Gud og hvønn mann tað.

Nú veit eg sjálvandi ikki um tú ert giftur og hevur børn. Men um tey t.d komu yvir til tín ein dagin, og søgdu,: Babba eg eri samkynt/ur, tá vóni eg at tú fert at siga. Góða/í tað er alt í lagi, eg elski teg kortini, og góðtaki teg, um tann, tú ert, (ella um tað oftani er við foreldrum, so gongur tað oftani eitt sindur tíð, við at venja seg við tankan).

Leygardags- ella tórsdagsjohan?

Hergeir Nielsen

Johan Dahl sigur meg loypa framav, og at hava mistikið meg í sambandi við villleiðandi umrøðu hansara av einum brævi frá danska verjumálaráðharranum, Svend Aage Jensby.

Soleiðis er sjálvandi ikki. Á internetinum hoyra vit framvegis útvarpið, og tey, ið leggja í, kunna har lurta uppaftur eftir Johan Dahl.

Leygardagin 30. nov. kl. 18.30 hoyra vit Johan Dahl í útvarpinum siga:

"Og har var Anfinn eisini á fundi, løgmaður, og bleiv spurdur um hetta skriviið, sum var komið frá Jensby."

Tórsdagin 4. des. lesa vit Johan Dahl í Dimmalætting:

"Tað skriv, sum eg vísti til í samroðu míni við útvarpið og segði, var ókent fyri meg inntil fundin í løgtingshúsinum , - var tað skriv, sum Hergeir Nielsen seinni hevur sent til løgmann, …"

Í báðum førum er tað Johan Dahl, sum tosar og skrivar, og ongum nýtist at leggja seg út í hetta orðaskifti hansara.

Tað er ringt at vita, hvørjum Johan Dahl trýr, og verri at vita, hvørjum vit onnur skulu trúgva?

Leygardags- ella tórsdagsjohan.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Kenna gleði av at gleða onnur

Tað er lítil ivi um, hvørji jólaynskir vit føroyingar hava, hóast vit kunnu verða ósamd á mongum økjum, segði Lasse Klein m.a. í røðu sínari tá jólatræið í Saltangará var tendra.

Lasse Klein

Vit halda jól, tí ein søguligur tilburður fór fram fyri meira enn 2000 árum síðani, og fekk avleiðingar, ið fevndi langt út um søgurnar mark, og sum hevur tídning fyri hvørt einstakt menniskja. Tí er øll vón um eina gleðiliga framtíð eisini knýtt at teirri fyri okkum so hugtakandi frásøgnini um føðing Jesusar í fjósinum og eingla-songinum úti á markini.

Hví júst Bethlehemsbarnið

Tá ið vit hugsa um, hvussu nógv stórmenni heimurin hevur fostrað, bæði á einum og øðrum øki,so er tað, sum vit ikki sleppa frá spurningunum, hvat tað er, sum júst gerð jólaboðskapin til nakað serligt. Tað eru so nógv børn fødd síðani barnið føddist í Bethlehem, so hví júst halda føðingardagin hjá Bethlehemsbarninum? Og svarið er heilt einfalt hetta, at við føðing Krists var nakað avgerandi hent mannaættini.

Tað kemur heilt av sær sjálvum, at tann sum er glaður, eisini letur gleði sína koma fram í ljósmála. Geva vit burtur av henni til onnur, tá verður gleðin enn størri. Vit minnast til orðini í Halgubók: "gevið øðrum lut í gleði tykkara". Og jólini bera okkum boð um eina gleði, og sum skal vera fyri alt fólkið.

Ikki bara okkum sjálvi

Men latum okkum kortini minnast til, at friður á jørð, so sum hann verður fráboðaður í jólaboðskapinum, er ikki nakað sum kemur av sær sjálvum. Søgan vísur okkum, at aðaltreytin fyri friði er tann: at vit tosað við hvønn annan, at vit skilja hvønn annan, at vit hugsað um onnur enn okkum sjálvi. Ja heilt greitt, at vit eru góð við hvønn annan.

Vit síggja tað í teimum vøkru og friðsælu barnaeygunum, og í barnadøgum okkara kendu vit nakað av hesum sama, tá ið hjarta bankaði í barmi, og eyðuni hugdu at jólanna durum. Í fyrstuni hómaðu vit bert smáar glottar. Men so læt ljósið seg upp, og hin mikla halga stundin dalaði oman úr erva. Ikki okkurt ljós, sum onkur sá í myrkrinum. Ikki onkur, ið sigur okkurt orðið.

Hvørji eru vit?

Í hesum jólaljósinum hendir altíð nakað umráðandi í okkara lívi: Tað sær ljós á okkum, so vit síggja at ganga, og eisini síggja í tí ljósinum, hvørjar menniskjur vit í verunleikanum eru.

Jólaevangeliið man vera kendasta søga í øllum bókmentum okkara. Øld eftir øld hevur hesin boðskapur ljóðað víða hvar í heiminum sum ein boðberi til okkara um eina gleði og um ein frið, ikki fyrireikaður av mannahondum, men av Gudi sjálvum, tá hann læt son sín taka búgv okkara millum.

Ynski um frið og gleði

Í jólaevangelinum møta vit soleiðis allar størsta ynski mannaættanar: ynski um frið og ynski um gleði í einum heimi, har ið hesi bæði so ofta eru avloyst av haturi, kríggi, neyð, hungri og sorg.

Síðani hetta evangeliið ljóðaði av fyrstan tíð er einki vorðið øðrvísi: Í staðin fyri tann nógv ynskta friðin hava vit støðugt havt kríggj, og tann mannaheimur, ið upprunarliga vildi bjarga sær sjálvum við tekniskum framstigum, er ivandi og ráðaleysur. Og tí kann sonn gleði bert valda har, ið vit kenna gleði av at gleða onnur, tí gleðiboðskapurin er ætlaður okkum øllum.

Lyklaorðið komandi dagarnar telur seks bókstavir: F R I Ð U R. Hetta orðið trýnur inn í hvønn krók í landinum, sprettur út úr kirkjum, samkomuhúsum, fjølmiðlum og úr barminum hjá øllum kristnum fólkum.

Hóast alt

Vit eru mong vaksin og børn sum eru komin saman her í kvøld. Um eina løtu verða ljósini tendraði á jólatræðnum. Men hvønn dag hoyra vit um ørskapin úti í heimi: um verju av londum, vápn, kríggj, dráp, píngin, hungur, ótta og sorg, og syrgilista av øllum er at hoyra um hungrandi børn orsaka av mannaeði, og tí man lítil ivi verða um, hvørji jólaynskir vit Føroyingar hava, hóast vit kunnu verða ósamd á mongum økjum: ósamd politiskt, ósamd átrúnarliga, ósamd í gerandisdegnum, men kort ini er eingin ivi um, at eitt av okkara felags jólaynskjum er hetta: at friður á jørð og í menniskjum góður tokki má valda í heiminum nú og í framtíðini!

Og tí kunnu vit eisini fegnast um, at Jesu barnið kom til okkara jólanátt við friði og er ljóslivandi og máttmikil. Í okkara trúgv finna vit sjálva gleðina og kunnu tí syngja saman av fullum huga: GLEÐILIG JÓL!

Eitur nýggi formaðurin í Sosialdemokratiet Eidesgaard?

Kai Vágfjall

At danskir politikarar altíð hava kent trongd til at til at leggja seg út í bæði føroyskan og grønlendskan politik er einki nýtt. Tað er heldur einki nýtt, at teir hava lagt seg út í bæði føroyskt og grønlendskt valstríð - síðsta grønlendska valstríðið var einki eindømi.

Men eindømi er tað, at føroyskir politikkarar blanda seg uppí grønlendskt valstrið. Hetta hendi nú formaðurin í føroysku deildini av Sosialdemokratiet, beinleiðis legði seg út í grønlendska valstríðið, sjálvan valdagin.

Eftir at hava hugsa meg um eina løtu, spurdi eg meg sjálvan, um Jóannes Eidesgaard kanska var vorðin valdur til formann í Sosialdemokratiet??? Tankar mínir leitaðu aftur til einaferð í 70-árini, tá hesin imperialistisk flokkur var, sum ikki einaferð, í leiðarakreppu, og onkur til stuttleikar hevði skotið upp at bióa Atla Dam taka um endan.

Danski flokkurin Vinstri legði seg eisini uppí grønlendska valstríðið, og bjóðaði seg til at fáa Grønland aftur upp í ES. Sosialdemokratiet hevur sum er ongan formann, og sjálvandi vildu hesir imperialistar ikki vera verri fyri enn Vinstri, so tað næsta vit síggja er grein frá formanninum í deildini í Føroyum.

Tað er gott at seta sær høg mál. Jóannes hevur nú í eini 10 ár droymt um at gerðast føroya løgmaður, men nú hesar vónir tykjast at fjarða burtur, sær tað út, sum at hann í staðin hevur latið seg lokkað at skriva hesa niðurgerðandi grein um landsmenn sínar, við tí vón kanska at gerast formaður í móðurflokkinum - ja kansta forsætisráðharri. Grønlendingar hava eina meira virðiliga viðferð uppiborna, enn hesa frá sosial- demokratiet og formanninum í føroysku deildini.

Jú harra forsætisráðharri. (Javel, hr. minister) Livst so spyrst.

Hvat er føroyskt?

Hanna Vang

Í skúlanum hevur mann mangan hoyrt og hoyrir tað enn "Hatta er ikki føroyskt". Orsøkin til at mann hoyrir tað er, at næmingarnir brúka onkur orð, sum lærarin ikki metir eru føroysk men donsk. Men so er spurningur, hvat er føroyskt? Er tað ikki tað, sum føroyingar snakka?

Høvuðstrupulleikin í hesum liggur í skriftmálinum, tí tað er ein almennur hugburður, at skriftmálið er rættari enn talumálið, men hetta er púra skeivt. Skriftmálið er til fyri at úttrykkja talumálið. Hesin almenni hugburður kemur av, at føroyingar so leingi vóru uttan skriftmál. Og tí var tað vigtugt, tá føroyingar endiliga fingu sítt egna skriftmál, at mann royndi at varðveita tað serføroyska. Men at málið tá var ávirkað av donskum er eitt faktum. Menn royndu so at fáa øll hesi "donsku" orðini úr málinum og seta føroysk í staðin, men tað hevur enn ikki eydnast, og tí er tað eisini uppá tíðina, at mann aksepterar, at í føroyskum eru orð, sum hava sín uppruna í donskum, men sum nú kunnu kallast føroysk. Tey hava verið brúkt í fleiri hundrað ár og eru tí somikið inngrógvin í tað føroyska málið, at mann gott kann kalla tey føroysk. Tað eru nógv dømi uppá tílík orð, her kunnu nevnast nøkur: "ferdugt", "fjernsyn", "behandla", "betala", "begynna", "tonkja", "forstanda", "viss" o.o.

Eitt er at mann roynir at seta mørk og at verja móðurmálið, og tað er eisini púra rætt, men eitt annað er at akseptera, at í føroyskum eru rúgva av upprunaliga donskum orðum, líka sum tað eru ein rúgva av upprunaliga norrønum ella íslendskum orðum. Tað er snedugt, at fólk flest halda, at orð úr norrønum ella íslendskum skulu vera rættari enn orð úr donskum. Tað má vera orsakað av, at føroyingar hava verið undir donskum valdi so leingi, at ein illvilji er ímóti donskum. Men harafturímóti hava fólk virðing fyri íslendingum, tí teir hava varðveitt sítt upprunaliga mál alla tíðina, eisini undir tí danska valdinum; men teir hava eisini havt eitt skriftmál at styðja seg til í mun til føroyingar.

Eg havi her víst á, at danskt hevur havt stóra ávirkan á føroyskt, og tað mugu vit akseptera. Um vit ikki gera tað, fer tað at følast ónatúrligt og møðsamt at skula úttrykkja seg á føroyskum. Málið skal helst ikki vera "so føroyskt, at mann ikki forstendur tað".

Opið bræv til býráðið:

Taka alt frá okkum!

Hví vera ungur, tá ein ikki fær loyvi til tess?

10. a í Tórshavnar kommunuskúla

Fyri okkum 16-17 ára gomlu er als einki stað at fara í vikuskiftinum. Einasta staðið, vit sleppa inn, er uppi í Badmintonhøllini millum 12-13 ára gomul. Áður vóru bólkar, ið spældu, sum fekk tey eldru at koma, men hetta síðsta árið hevur einans »Djshow« verið, sum er alt ov einstáttað.

Áður byrjaði dansurin eisini kl. 23 og endaði kl. 04. Nú byrjar dansurin kl. 22 og endar longu kl. 02, sum fær enn yngri børn at koma. Og hvar fer ein so millum kl. 02 og 04, tá man fer oman í býin at hitta vinir og kenningar? Á henda hátt, kann hugsast, fer harðskapur og kriminalitetur at vaksa í Havnini.

Okkara ynski er, at okkurt stað verður fyri okkum 16-17 ára gomlu í vikuskiftinum; og ikki skal ein noyðast at gjalda 150 kr. fyri nakrar fáar tímar, tí hetta er alt ov kostnaðarmikið.

Og so er eisini spurningurin um sjónvarpið. Rás Tórshavn var ein rás, sum vit ungu vóru ógvuliga glað fyri, av tí at SVF ongar ungdómssendingar og –filmar hevur at bjóða. Ístaðin hava tey óteljandi endursendingar fyri børn og tey vaksnu. Men so var RásTórshavn eisini tikin frá okkum. Hetta bert fyri nakrar fáar krónur eyka um mánaðin. Borgarstjórin hevur sjálvur alment sagt, at býráðið ikki skal veita borgarunum tænastur; men hvat sita teir har so fyri?? Bara tí at býráðið ikki tímir at takast við hesa sak longur, noyðist hetta ikki at ganga út yvir okkum øll! Og fleiri av okkum hava heldur ikki ráð til nýggju loysnina, býráðið hevur givið.

Vónandi verður hetta tikið til eftirtektar.